

# Jólakonsert í Vesturkirkjuni

KONSERT

Árliga jólakonsertin í Vesturkirkjuni í Havn verður sunnukvøldið 14. desember kl 20.

Sum vant spæla Havnar Hornorkestur og GHM jólaløg, meðan Kristiliga Sangkórið, Sólarmagn á Velbastað og Tórshavnar Kamarkór fara at syngja jólasangir.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Petronella Christine Lamhauge**
Toftir

andaðist týsdagin 9. desember
á Landssjúkrahúsinum, 87 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni
leygardagin 13. desember kl. 13.00.

*Vegna familjuna*
**Jóhanna, Nicolina, Louisa og Sámal**

*Tey, ið vilja minnast Nellu, kunnu lata
lata eina peningagávu til Fríðrikskirkjuna.*




# Jólakonsert í Fuglafjarðar kirkju



KONSERT

Fuglafjarðar sangkór og hornorkestur hava konsert í Fuglafjarðar kirkju sunnukvøldið kl. 20.00. Kórleiðari er Frits Johannesen, orkesturleiðari Ken McLeod, Heðin Kambsdal hevur orgulfylgisspælið og Eyðun á Lakjuni klaverfylgisspælið.

Kórið hevur eini 75 ár á baki, og hornorkestrið er 34 ára gamalt. Hetta er ein partur av jólahaldinum í bygdini, at konsert er í kirkjuni fyri jól.

Sangkórið syngur føroysk jólaløg, útlendsk jólaløg og eitt vælljómandi jólalag fyri kór og orgul av John Rutter. Annars fer kórið aftur at syngja jólakvøld. Henda siðvenja er eins gomul og kórið.

– Hornorkestrið spælir ensk jólaløg, og spælir orkestrið í kirkjuni jólaaftan, sum tað hevur gjørt, síðani tað sá dagsins ljós, sigur Frits Johannesen, kórleiðari.

# Jólhugni heima á Garði í Hoyvík



*Torvroykurin hongur yvir Gamla Hoyvíksgarði um vikuskiftið, tá Fornminnissavnið skipar fyri jólahugna*

JÓL
*Tíðindi frá Fornminnissavninum*

Ein afturvendandi hending upp undir jól er jólatiltakið í útisavninum í Hoyvík, sum Føroya Fornminnissavn hevur skipað fyri tey seinastu árini. Í ár verður tað gjørt í samstarvi við felagið Sisam og onnur.

Tveir dagar eru settir av til tiltakið:

Leygardagin 13. desember frá kl 11 til 18 og sunnudagin 14. desember frá kl 13 til 18.

Hini árini hevur veðrið verið gott og hugnaligt hevur verið at vitja útisavnið.

Torvroykur hongur um flagtekjur og tún, har foreldur saman við børnum ganga og práta. Tað rýkur av nýbakaðum drýli og kardamommum í roykstovuni í Hoyvíksgarði. Og av granni har Kiwanis selir jólatrø. Í turkihúsinum fæst ein kaffimunnur og okkurt søtt afturvið. Har verða eisini heimavirkaðir lutir seldir. Í smiðjuni smíðar smiðurin okkurt smátt til jóla.

Gamli Hoyvíksgarður verður jólaskrýddur, og millum úthúsini hanga ljós og lýsa upp í vetrarmyrkrinum.

Teymaríðing við føroyskum rossum verður báðar dagarnar, so at børnini kunnu sleppa ein túr á rossabaki. Hetta kostar eyka.

Skipað verður fyri smáum »granskingarferðum« í útisavninum, har børn, smá og stór, kunna loysa onkrar uppgávur.

Atgongugjald er sett til 20 kr fyri vaksin, men tað er ókeypis fyri børn. Yvirskotið fer til at stuðla føroyskum rossum.

Hetta skal verða eitt høvi hjá fólki at smoyggja sær burtur úr jólastressinum og finna eina hugnalig og friðarliga løtu í náttúruvakra umhvørvinum hjá Fornminnissavninum niðri í Hoyvíkini.

# Skemt fór út um mark

**Heðin Mortensen hevur fingið treytaleysa umbering frá teimum, ið standa fyri heimasíðuni www.spik.dk**

VALLÝSING
*Eirikur Lindenskov*

– Umvegis tíðindasíðuna www.olivant.fo hava vit frætt, at tygum hava meldað heimasíðu okkara www.spik.dk fyri misbrúk av valtilfari tygara. Hetta harmar okkum nógv, tá lýsingin bert varð løgd á heimasíðu okkara í spølni, ætlað til skemt ímillum vinfólk. Vit duga tó væl at síggja at vit eru farnir yvir um mark, og at hetta hevur verið til stóran ampa fyri tygum.

Soleiðis siga teir, sum standa fyri heimasíðuni www. spik.dk í teldubrævi til Heðin Mortensen, løgtingsmann.

Fyrri í vikuni sást ein bronglað vallýsing hjá Heðini Mortensen á hesi heimaíðu, har Heðin Mortensen sást veitra við Dannebrog og m. a. lova, at »nú skal lænast«.

Heðin Mortensen vildi hava at vita, hvør tað var, ið soleiðis hevði stolið og misbrúkt hansara valtilfar, og tá hann ikki kundi finna út av, hvør átti síðuni, so meldaði hann tilburin til løgregluna.

Menninir aftan fyri síðuna siga víðari í brævinum til Heðin Mortensen, at »dentur skal leggjast á, at hetta ongantíð var ætlað sum nakað, ið skuldi skaða tygum ella umdømi tygara. Vit vilja tí umbera fyri gerðina og vóna, at tygum ikki hava havt ov nógvan ampa av tilburðinum«.

Samstundis biða menninir Heðin Mortensen um at taka kæruna til løgregluna aftur.



# Listaframsýning í Gallerí Ribarhúsi í Fuglafirði

**Ung donsk listakvinna letur upp framsýning í Gallerí Ribarhúsi. Framsýningin verður opin fram til 31. desember**



LISTAFRAMSÝNING

Hin 19 ára gamla listakvinnan Kathrina Jeppesen, ið hevur røtur úr Fuglafirði, læt hósdagin 11. desember upp listaframsýning í Gallerí Ribarhúsi í Fuglafirði. Á framsýningini verða nakrir av nýggjari oljumálningar hennara at síggja. Íblásturin til málningarnar hevur Kathrina úr føroysku náttúruni - landsløg, seyður og áir.

Kathrina Jeppesen, ið er búsitandi í Odder við Århus, hevur áður tikið lut á nøkrum lokalum framsýningum í Danmark. Henda framsýningin er hennara fyrsta sjálvstøðuga framsýningin í Føroyum. Hóskandi var at hava hana júst í Fuglafirði - í heimbýi móðurinnar.

Framsýningin letur upp hósdagin kl. 17.00. Hon verður opin fram til 31. desember 2003.

# Luciakonsert í Norðurlandahúsinum

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 13. desember 2003 kl. 19.00 verður tann árliga Luciukonsertin í Norðurlandahúsinum, og eru tað Musikkskúlin og Norðurlandahúsið, sum skipa fyri tiltakinum.

Á skránni verður m. a. eitt nýtt barnakór hjá Musikkskúlanum undir leiðslu av Sigrid Sivertsen. Hetta eru børn, sum ganga í 3.-6. fl, og eitt rytmiskt orkestur undir leiðslu av Jónleif Jensen spælir undir.

Síðani kemur Luciumusikksspælistovan á pallin – undir leiðslu av Sigrid Sivertsen og Claire Thomsen. Jólaevengeliið verður framført við sangi og sjónleiki. Eitt instrumental orkestur, undir leiðslu av Claire Thomsen spælir eisini.

Aftan á syngur ein vaksinbólkur við Eyð & Barbaru.

Kvøldið endar við Ungum Stjørnuskotum, sum syngja jólasangir og felagssangi.

# »A TAKA« – nýggj føroysk/bulgarsk fløga

**Tutl gevur út fløgu við Kára Sverrissyni, Valeri Dimchev og Desislavu Dimchevu**

FLØGUÚTGÁVA

Ein nýggj fløga við heitinum »A TAKA« er komin í handlarnar.

Tónleikurin á fløguni er í stóran mun improviseraður sangur og tónleikur til nýggjar tekstir á føroyskum, ið Kári Sverrisson skrivaði á ferð í Bulgaria í heyst. Á fløguni eru eisini siðbundin bulgarsk fólkaløg og okkurt nýtt lag hjá bulgarsku tónleikarunum Valeri Dimchev og Desislavu Dimchevu.

Valeri Dimchev, ið er kendur í Bulgaria innan bæði jazz-tónleik og fólkatónleik, og sum spældi við á seinastu fløguni hjá Enekk ("Fýra nætur fyri jól"), spælir bulgarska streingjaljóðførið tambora. Desislava Dimcheva syngur. Kári Sverrisson spælir akkustiskan gittar og syngur.

Upptøkurnar vórðu gjørdar síðst í september mánaði í bygdini Leshko í útsynningspartinum av Bulgaria, har ið Valeri Dimchev hevur eitt studio.

Heitið »A TAKA« er bulgarskt og merkir "Soleiðis".

Tað er Tutl, ið gevur hesa fløguna út, ið er fyrra fløgan av tveimum, ið vórðu tiknar upp í Bulgaria í heyst. Seinna fløgan, har ið Agnar Lamhauge eisini er við, kemur út einaferð í vár.




